# Barna- og útbugvingarmálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 27.01.2025 |
| Mál nr.: | 25/01750 |
| Málsviðgjørt: | CJI |
| Ummælistíð: | 4 vikur |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

**Kunngerð um broyting í kunngerð um próvtøkur á miðnámi**
(Um at nýta eftirlitsforrit til skrivligar próvtøkur)

**§ 1**

Í kunngerð nr. 8 frá 22. januar 2013 um próvtøkur á miðnámi, sum broytt við kunngerð nr. 22 frá 7. apríl 2014, kunngerð nr. 59 frá 11. mai 2016, kunngerð nr. 108 frá 16. juli 2019 verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Inngangurin verður orðaður soleiðis:

Við heimild í § 19, stk. 1 og 2, § 20, stk. 1, § 21, stk. 2, § 32, stk. 3, § 39, stk. 4 og § 40, stk. 2 í løgtingslóg nr. 62 frá 15. mai 2012 um gymnsialar miðnámsútbúgvingar verður ásett:

**2.** í § 14 verður sum stk. 4 sett:
"*Stk. 4.* Útbúgvingarstovnurin kann seta nærri reglur, sum krevja, at næmingar nýta eftirlitsforrit á teldum, teldlum, og líknandi undir skrivligum próvtøkum, eftir góðkenning frá landsstýrismanninum."

**§ 2**

Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið, 27. januar 2025

**Djóni Nolsøe Joensen**
landsstýrismaður

/ Poul Geert Hansen